**Bilur við skaða til sølu**

Toyota Carina 2,0 Sli sedan árg. juli 1995 við skaða verður seldur fyri hægsta boð.

REYNI SERVICE

Vegurin Langi -188 Hoyvík - Tel. 313040

Sosialurin - 311820

ADC-Heilsølan
Láarvegur 14 - Tórshavn - Tlf. 315828 - Fax 315893
ARBEIÐSHANDSKAR
Til øll endamál – bæði á sjógvi og landi
LANDSINS STØRSTA ÚRVAL
frá eingangshandskum til fóðraðar japan-handskar
ADC
BEINLEIÐIS FRÁ FRAMLEIÐARA

DAGFØR
TEG
Tekna teg sum haldara nú, so fært tú Sosialin ókeypis restina av hesum ársfjórðinginum
HALT
SOSIALIN

Tíðindablaðið
sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

ÓKEYPIS
Sosialurin rindar postgjaldið
64

Undirritaði teknar seg sum haldara av Tíðindablaðnum Sosialinum, og fái blaðið *5 ferðir um vikuna.*
Restina av hesum ársfjórðingi fái eg Sosialin
*ókeypis!*

Navn:
Búst.:
Postnr., bygd, býur:
Tlf.:
Undirskrift:

☐ Haldarar í Føroyum: 320,-/ársfj.
☐ Haldarar í Europa: 490,-/ársfj.
☐ Onnur lond: Ymiskir prísir
☐ Internet: 240,-/ársfj.

Viðmerking:

# KÆRA - Um at mismunur verður gjørdur á starvsfólki innan almenna umsiting

Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið undirskrivaðu 4. januar 2000 eina semju, sum skuldi tryggja at viðurskiftini á Innheintingarøkinum komu í rættlag aftur, aftaná ósemjuna og arbeiðssteðgin, sum tók seg upp 19.11.1999.

Hóast semjuna eru viðurskiftini ikki komin í rættlag aftur. Í fyrsta umfari søgdu 3 fólk upp, orsakað av ótolandi arbeiðsviðurskiftum undir táverandi leiðslu. Tey vórðu útifryst av leiðsluni, og tað var ikki brúk fyri teirra fakliga kunnleika. Seinni varð greitt í desentraliseringsætlanini at nøkur ávís fólk vórðu útvald at arbeiða innan økið. Desentraliseringsætlanin tóktist í stóran mun at verða ein beinleiðis útreinsan av ávísum starvsfólkum.

Tá hesi 3 siga upp verða tey biðin um at fara til hús í uppsagnartíðini, og leiðslan segði tá fyri hinum starvsfólkunum, at nú var arbeiðsfriður og nú skuldi gongd koma á arbeiðið aftur við desentraliseringini.

Tá so 4 fólk afturat søgdu upp vegna ótolandi arbeiðsviðurskifti kom panikkur í leiðsluna. Tað eina starvsfólkið av hesum 4 vildi leiðslan hava at fara til hús beinanvegin, meðan leiðslan troytti allar møguleikar at fáa hini 3 at taka uppsøgninar aftur.

Øll tey 7 fólkini hava sagt upp, tí tey kundu ikki liva við at mismunur varð gjørdur millum arbeiðsfelagar í reinari hevnissøku. Eingin av teimum hevur fingið annað starv í boði.

Á starvsfólkafundi á Innheintingarøkinum og á Streymoyarøkinum fríggjadagin tann 25 febr. fingu starvsfólkini at vita frá Óla Heinesen, stjóra á T&S, at økisstjórin Birgit V. Ottosen fór at siga seg úr starvi og at óvist var, hvussu varð við Regini Thomsen, fyribilssetta leiðaranum á Innheintingarøkinum. Starvsfólkini fingu eisini at vita, at tey bæði, Birgit og Regin, ikki komu aftur til arbeiðis á Innheintingarøkinum.

Ein av orsøkunum til at økistjórin fyri Innheintingarøkið skuldi siga upp, varð at hennara óhepni leiðsluháttur nú eisini hevði breitt seg inn á Streymoyarøkið, og darvaði arbeiðnum har.

Eftir fyrispurning frá starvsfólkunum svaraði Óli Heinesen, at Eyðfinn Hansen, økisstjóri, kom at virka sum leiðari fyri Innheintingarøkið

Leygarkvøldið boðar Óli Heinesen í Útvarpi Føroya frá, at Birgit V. Ottosen ikki hevur sagt seg úr starvi, og at tað kemur ikki uppá tal, at tey 7 fólkini sum hava sagt seg úr starvi koma aftur til arbeiðis. Mánamorgun fáa 2 av teimum, sum hava sagt seg úr starvi, bjóða at koma aftur til arbeiðis.

Mánakvøldið 28 febr. boðar Óli Heinesen í Sosialinum frá, at trý av teimum sum hava sagt upp kunnu halda áfram, meðan tað ikki kann koma uppá tal, at hini fýra, sum hava sagt seg úr starvi, koma aftur til arbeiðis.

Tey 3 fólkini, sum upprunaliga ætlanin var skuldu í stýrið á Argjum at arbeiða, ynsktu at arbeiða innan Streymoyarøkið. Seinni hevur eitt av hesum fólkum eisini sagt seg úr starvi, so at samlaða talið á fólkum, sum nú hava sagt upp er sostatt komið uppá 8.

Sum støðan er nú, vil ongin av teimum 8 starvsfólkunum halda fram. Av hesum átta hava 4 fingið boð um at fara heim, ein er biðin um at fara av Innheintingarøkinum, og møta til arbeiðis í Fíggjarmálastýrinum á Argjum, og 3 hava fingið boð um at arbeiða í uppsagnartíðini.

Her er púra greitt, at leiðslan fer inn í málið aftur, og peikar út fólk, sum tey halda seg kunna góðtaka, meðan onnur, sum eru komin á "svartalista" hjá teimum og tískil skulu fáast av vegnum, fáa øðrvísi viðferð.

Her er leiðslan á T&S so langt úti, at orð mestsum ikki eru fyri hesum. Vit fáa okkum ikki at trúgva, at hetta ikki fær avleiðingar fyri hesa leiðslu. Øll framferðin er vanvirðislig mótvegis starvsfólkunum og fullkomiliga í andsøgn við tann almenna starvsfólkapolitikkin, sum løgmansskrivstovan hevur sett í verk.

Hetta málið vísur greitt, at grovur mismunur og grovt órættvísi er framt millum og mótvegis starvsfólki innan almenna umsiting. Vit fara tí at heita á tygum harra løgmann, sum ovasta starvsfólkaleiðara, at taka hetta álvarsmál upp beinanvegin og fara vit tí við hesum skrivi at kæra gongdina í hesum máli.

Fíggjarmálastýrið, sum er okkara sáttmálapartur, brýtur ferð eftir ferð gjørdar avtalur. Hetta eru vit von við. Men tað sum vit í hesum føri kæra er, at grovur mismunur er gjørdur millum starvsfólk innan almenna umsiting, og at hetta er ein miðvís ætlan frá leiðslunar síðu.



*Gunnleivur Dalsgarð, formaður í Starvsmannafelagnum*

At skipaður mismunur og útreinsan av starvsfólki innan almenna umsiting ótálmað fer fram, kunnu vit ikki livað við, og vóna vit at tygum heldur ikki kunnu liva við hesum.

Einasta sum skal til fyri at fáa Innheintingarøkiða at virka aftur er, at øll fáa somu sømdir. Nú økistjórin er burtur er grundarlagið fyri uppsagnunum eisini burturi, og tí skuldi tað verið sjálvsagt at øll koma aftur til arbeiðis, og byrja verður av nýggjum aftur eftir leistinum í semjuni frá 4. jan. 2000. Eingin skal billa okkum inn, at ikki er nokk at tríva í, nú eingin innkrevjing hevur verið síðani seinast í nov. 1999.

Løgmansskrivstovan hevur brúkt nógva tíð og orku uppá at orða ein almennan starvsfólkapolitikk, sum í sínum inngangi leggur upp til: _*"at tryggja tann týdning, sum mál, mið og menning hava fyri at skapa trivna, dygd og samstarv."*

Í øllum teimum brotum av starvsfólkapolitikkinum, sum higartil eru sett í verk, er høvuðssettningurin, at røtt framferð, rættvísi og virðing verður víst starvsfólkunum.

Men vísandi til ta viðferð, sum umsitingin á Toll og Skattstovuni — Innheintingarøkinum, hevur givið sínum starvsfólkum, kann ikki sigast at hetta arbeiðið hevur fingið tann avgerðandi týdning, sum løgmansskrivstovan leggur í ein skipaðan starvsfólkapolitikk, og at hetta arbeiðið tískil er nyttuleyst og harafturat verður beinleiðis mótarbeitt av eini almennari stovnsleiðslu.

Semjan, sum gjørd varð 4. januar, er ikki í gildi longur og gera tygum harra løgmaður einki við málið, sær Starvsmannafelagið seg noytt at taka neyðug stig fyri at tryggja, at okkara limir fáa eina rættvísa viðferð. Vit fara ikki at góðtaka, at mismunur og órættvís viðferð verður gjørd mótvegis starvsfólkum. Soleiðis sum tygum, sambært øllum útsendum tilfari, ætla at skipa tann almenna starvsfólkapolitikkin, eigur ongin ivi at vera um, at tygum eru samdur við okkum í hesum. Tí vóna vit at tygum taka neyðug stig í hesum máli.

**Gunnleivur Dalsgarð, formaður**

2 ´arin

Leygardagur 11. mars 2000

# Korter í Hesti

Soleiðis gekk, tá blaðmaður og myndamaður endaðu í Hesti av óvart





Mynd: Jens Kristian Vang

# Tað einfalda valið

Bondini til heimbygdina vóru sterk. Tey skuldu ikki bara heim til Føroya, men heim aftur á Sand. Hjúnini Randi og Christian Joensen fluttu fyrr í ár heim til Føroyar, eftir at tey høvdu búð í Danmark síðani 1993. Úti er gott, men heima er best, staðfesta tey í dag. Lesið miðsíðurnar